**Reglugerð fyri Barnabókaheiðursløn Tórshavnar kommunu**

§1
Heiðurslønin ber navnið Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs.

§2
Heiðurslønin verður latin á hvørjum ári av Tórshavnar býráð við teirri upphædd, ið verður ásett av mentamálanevndini.

§3
Heiðurslønin verður latin fyri bóka- og listaverk fyri børn, sum verður hildið at vera virðislønarvert. Heiðurslønin kann latast rithøvundum, týðarum, listafólkum og einstaklingum, sum útgeva barnabøkur.

§4
Latnar verða tvær virðislønir. Tó kann nevndin geva bert eina ella onga, um nevndin tað árið kemur til tað niðurstøðu, at bert eitt ella onki verk er virðislønarvert.

§5
Fimmmannanevnd ætlar um og ger av, hvør skal fáa virðislønina. Limir í fimmmannanevndini eru: barnabókavørðurin á Býarbókasavninum í Tórshavn, sum eisini er skrivari í nevndini, ein limur valdur av Felagslærararáðnum við kommunalu skúlarnar í Tórshavn, tveir limir valdir av Tórshavnar býráð og formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs, sum er formaður. Tað hvílir á barnabókavørðinum at kalla saman til fundar í hesi nevnd.

§6
Heiðurslønin verður latin undir slíkum formi, sum fimmmannanevndin saman við mentamálanevndini fyrisetur. Býráðsformaðurin handar heiðurslønina saman við heiðursbrævi, har tað er tilskilað, hvat verk heiðurslønin er givin fyri, og hvat eftir meting nevndarinnar gjørdi verkið virðislønarvert.

Samtykt av býráðnum 29. nov. 1993.